# Elektrikararnir hjá Pam Offshore viðgera støðuna í dag

**Allir elektrikararnir, sum arbeiða fyri Pam Offshore í Noregi, fóru á fund klokkan 10 í morgun at tosa um viðurskiftini. - Vit hava ætlað hetta leingi, og nú verður so hesin fundurin, har menninir eisini fáa høvi at heilsa upp á hvønn annan og skifta orð, sigur stjórin í Pam Offshore, Magnus Magnussen**

FUNDARVIRKSEMI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Magnus Magnussen, stjóri í Pam Offshore, sigur, at felagið leingi hevur ætlað at samlað manningina, sum arbeiðir í Noregi, saman til fundar, har teir í fyrsta lagi hava høvi at hittast og tosa saman um felags mál.

- Menninir fara og koma, og tað er sjáldan, fleiri av teimum hittast. Nú eru so teir flestu heima.

Magnus dylir tó ikki fyri, at vanlukkan í Stord hevur skundað undir hendan fundin, sum eisini fer at viðgera støðuna rundan um flogvanlukkuna í Stord.

- Í løtuni eru eini 30-40 mans heima, og tí liggur hetta eisini væl fyri í løtuni, sigur hann.

### Flogvanlukkan

Stjórin vísir á, at Pam Offshore fær einki gjørt við støðuna, soleiðis sum hon er, men heldur fyri, at kanska hjálpir tað monnunum at tosa saman um viðurskiftini.

- Tað verður leiðslan í Pam Offshore, sum fer á fund við menninar, og vit hava ikki biðið nakran annan um at vera við.

Spurdur, um tað kann hugsast, at sálarfrøðingur verður við, sigur hann, at tað hevur ikki verið ætlanin.

- Tað eru so mong, sum eru rakt av hesi syrgiligu vanlukku - ikki bara tey, ið vóru við og tey, sum mistu lív, ei heldur bara menninir, sum vit hava í arbeiði har yviri, men eisini alt Føroya fólk, sigur Magnus.

Pam Offshore hevur í løtuni einar 60 elektrikarar í starvi í Noregi, men beint nú er tann størri helmingurin heima í Føroyum.

-Okkara menn arbeiða fyri Aker Kværner Elektro. Teir flestu arbeiða við Snøvit-projektinum og ferðast tískil upp til Hammerfest. Hinir, sum í løtuni bert eru nakrir fáir í tali, arbeiða við projektinum, Orminum Langa.



*- Bæði í flogferðslu, bilaferðslu og til gongu kunnu vit koma út fyri hendingum, sum vit vildu verið fyriuttan. Heldur enn at kóka hesa syrgiligu hending upp, haldi eg, at vit eiga at royna at "dempa" okkum niðuraftur, sigur stjórin í Pam Offshore, Magnus Magnussena*

Magnus Magnussen sigur, at tá ið elektrikararnir fara úr Føroyum, flúgva teir úr Vágum, beinleiðis til Stavanger og onkuntíð til Keypmannahavnar og haðani upp til Stavanger.

- Síðan koma teir inn í charter-rutuna, sum Atlantsflog flýgur fyri Aker-fyritøkuna, sigur hann.

### Onkur uppliving

Í norsku fjølmiðlunum skilst, at fólk, sum arbeiða hjá Aker Kværner Stord, dagin fyri flogvanlukkuna í Noregi høvdu tosað um og funnist at trygdini umborð á flogførunum hjá Atlantsflogi.

Eftir vanlukkuna hava fólk vent sær til norskar fjølmiðlar við ymiskum frásagnum um ítøkiligar hendingar, sum hava órógvað ferðafólk í flogførunum.

Vit spurdu eisini Magnus Magnussen, um Pam Offshore hevur frætt um hendingar frá teimum monnum, sum felagið hevur í Noregi.

- Jú, vit hava hoyrt um onkra uppliving, sum fólk hjá okkum hava havt í flúgving við Atlantsflogi, men eisini við øðrum flogfeløgum. Men sum eg nevndi, liggur tað ikki í okkara makt at gera nakað við hetta. Tað eru ikki bara fólk hjá okkum, sum kunna gera óbehagiligar túrar. Flýgur tú nógv, ert tú meira útsettur fyri at gera onkran túr, sum ikki er so behagiligur. Sama er í bilaferðsluni, ið eg síggi sum ein størri generellan vanda enn flogferðsluna.

Magnus heldur ikki, vit eiga at bagatelisera tey viðurskifti, sum víst hevur verið á, men taka tey í størsta álvara. Hinvegin mugu vit ansa eftir, at alt ikki verður rørt upp í ein ellibita, tí tá veit eingin, hvar vit enda, sum hann tekur til.

### Mugu víðari

- Tað vil altíð vera soleiðis, at nøkur stúra meira fyri at flúgva enn onnur, og ert tú bangin á flogi, skal ikki nógv til, fyrr enn tú heldur, at okkurt er áfátt - eisini, tá ið alt er, sum tað eigur at vera.

Stjórin í Pam Offshore heldur, at kanska stúra føroyingar meira fyri at flúgva enn onkur annar, og felagið hevur eisini upplivað, at onkur av teirra monnum settist aftur í Føroyum, tí hann segði illveður.

- Sum allir føroyingar og tey, sum vórðu so hart rakt, harmast vit um ta syrgiligu vanlukku, sum hendi, men neyðugt er onkusvegna at koma víðari. Bæði í flogferðslu, bilaferðslu og til gongu kunnu vit koma út fyri hendingum, sum vit vildu verið fyriuttan. Heldur enn at kóka hesa syrgiligu hending upp, haldi eg, at vit eiga at "dempa" okkum niðuraftur, sigur stjórin í Pam Offshore, Magnus Magnussen.

---

El-Service á Skála:

# – Okkara menn hava alt gott at bera Atlantsflogi

**- Vit mugu ikki síggja burtur frá, at ein partur av atfinningunum úr Noregi botna í, at norðmenn vilja ikki hava útlendingar at arbeiða í landinum - uttan í slíkum føri, at hetta er átroðkandi neyðugt. So mikið kenni eg norðmenninar, sigur stjórin á El-Service á Skála, John Eli Olsen, sum hevur havt upp í 12 mans í Noregi**

FLOGVANLUKKAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

El-Service á Skála hevur havt upp í 12 elektrikarar í Noregi, og í løtuni hevur felagið 8 mans, sum arbeiða fyri felagið í Noregi. Nú syrgiliga flogvanlukkan í Stord hendi, vóru teir allir heima, men fara yviraftur, um alt gongur sum ætlað.

-Okkara menn hava arbeitt við projektinum, Orminum Langa, og hava soleiðis flogið við Atlantsflogi millum Stavanger og Molde við millumlending í Stord. Soleiðis hava teir eisini flogið á rutuni millum Føroyar og Stavanger ella Keypmannahavn.

John Eli Olsen, stjóri í El-Service, sigur, at hansara menn hava ongantíð reist iva um trygdina hjá Atlantsflogi, men hava hinvegin verið sera væl nøgdir við tænastuna og viðurskiftini í flogførunum.

- Eg havi ikki hoyrt eitt orð um nakað, og menninir hava verið stak væl nøgdir, sigur hann.

Stjórin vísir á, at onkuntíð hava seinkingar verið á onkrari rutu, tí bíðað hevur verið eftir fólki, men hetta er nakað, sum sjálvandi kann koma fyri, tá ið tú flýgur fyri eitt annað felag, ið hevur sínar uppgávur at røkja.

- Sum eg havi skilt, hevur onkuntíð verið bíðað eftir fólki, sum eru komin av boripalli, sigur hann.

John Eli harmast sum øll onnur um syrgiligu vanlukkuna, men heldur, at norðmenn bevíst hava blást aðrar hendingar, sum teir siga seg hava verið úti fyri, upp í norsku fjølmiðlunum.

- Eg kenni norðmenninar so mikið væl, at teimum hóvar ikki, at eitt útlendskt felag fær slíkar avtalur í Noregi. Norðmenn vilja ikki vita av útlendskari arbeiðsmegi - uttan í slíkum føri, har teir eru noyddir at taka annað fólk enn sítt egna inn. Hetta veit eg av royndum, sigur hann.

Stjórin fer so vítt at kalla ein part av tí ágangi, sum verið hevur á Atlantsflog, fyri "typiskt norskt", sum hann tekur til.

John Eli hevur verið burturstaddur og kom ikki heimaftur fyrr enn í fyrrakvøldið.

- Eingin av okkara monnum hevur sagt, at teir ikki fara yvir aftur til Noregs, men onkur hevur ringt um fregnast um støðuna, nú hendan vanlukkan hendi, sigur hann.

Stjórin í El-Service leggur dent á, at øll flogfeløg kunnu koma út fyri, at trupulleikar stinga seg upp við flogførunum.

- Eg havi sjálvur upplivað, at motorur hevur verið skiftur á flogfari, sum eg skuldi flúgva við til St. Johns. Hetta tók 10 tímar, og flogfelagið var einki minni enn Brittish Airospace.

John Eli Olsen sigur, at tær seinkingar, sum hansara fólk hava verið úti fyri, tí Atlantsflog hevur havt tekniskar trupulleikar, hava verið lítlar og ongar.

- Eg kann bara vegna mínar menn bera Atlantsflog alt gott. Saman við teimum, ið reka flogfelagið og føroyingum øllum, harmast vit um ta syrgiliga, sum er hent, sigur stjórin í El-Service.